# Silberbauer koyrdi ávirkaður




*Løgreglan váttar, at ein dani mikunáttina varð tikin fyri rúsdrekkakoyring, og FCK-leiðslan váttar, at Silberbauer varð steðgaður. - Men hann hevur sagt okkum, at hann stóð blóðroyndina og ikki varð handtikin, sigur Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri í FC Keypmannahavn. Her sæst Michael Silberbauer mikukvøldið á Tórsvølli, har hann skeyt tvey mál móti føroysku meistarunum HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast einki er váttað, bendir alt á, at 22 ára gamli stjørnuleikarin úr FC Keypmannahavn, Michael Silberbauer, varð tikin fyri rúsdrekkakoyring í Tórshavn undir uppihaldinum hjá danska meistaraliðnum í Føroyum í farnu viku. Løgreglan váttar, at ein dani varð tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring mikukvøldið klokkan 04.25, og FCK váttar, at Silberbauer varð steðgaður av løgregluni. Men ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm, sigur mótvegis løgregluni, at Silberbauer stóð blóðroyndina**

RÚSDREKKA

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Sekur ella ikki. Hetta er framvegis spurningurin um Michael Silberbauer og hansara ferð í Føroyum í seinastu viku saman við felagi sínum FC Keypmannahavn. Enn hevur eingin váttað nakað, men alt bendir á, at 22 ára gamli danski stjørnuleikarin, Michael Silberbauer, í farnu viku varð tikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring undir uppihaldinum hjá FC Keypmannahavn í Føroyum. Um hetta er sannleikin, verður talan allarhelst um avleiðingar fyri unga og evnaríka leikaran.

## Stóð blóðroyndina

Mánamorgunin var Sosialurin í sambandi við bæði føroysku løgregluna og FCK-bossarnar Niels Christian Holmstrøm og Flemming Østergaard, og verða báðar útgávurnar lagdar saman, bendir alt á, at FCK-talentið í framtíðini skal standa skúlarætt.

FCK-eigarin Flemming Østergaard gjørdist ikki sørt sintur, tá fyrispurningur varð settur honum um atburðin hjá Silberbauer í Føroyum, og hann lovaði, at hann beinanvegin skuldi kanna tíðindini, sum hann frammanundan einki hevði hoyrt um, og sum enn ikki hava verið í tí annars agressivu donsku pressuni.

– Hvis det passer, skal jeg love dig for, at du hører fra mig igen, sigur ein bersøgin og spontanur Østergaard, júst sum vit kenna hann. Løtu seinni ringir ítróttarstjórin í mæta danska felagnum, Niels Christian Holmstrøm, og hann hevur júst tosað við høvuðspersónin sjálvan, Michael Silberbauer.

– Silberbauer hevur júst sagt mær, at hann varð steðgaður mikunáttina eftir seinna dystin móti HB, men hann tvíheldur um, at hann stóð blóðroyndina og varð ikki handtikin av løgregluni. Sostatt vísa vit fyribils tíðindunum aftur, sigur Niels Christian Holmstrøm við Sosialin.

Sostatt sigur leiðslan í FC Keypmannahavn, at Silberbauer ikki koyrdi rúsdrekkaávirkaður, hóast hann varð steðgaður, men vert er at leggja til merkis, at hetta svarið bert er bygt á útsøgnirnar hjá Silberbauer sjálvum.

## Dani á støðini

Eftir hetta varð á øðrum sinni ringt á løgreglustøðina í Havn, og hóast vakthavandi ikki upplýsir persónsupplýsingar við støði í lógini, bendir alt á, at talan var um Michael Silberbauer.

Mikukvøldið eftir seinna FCK-dystin á føroyaferðini var FCK-hópurin nevniliga á diskotekinum í miðbýnum í Havn, Eclipse, og løgreglan váttar, at mikukvøldið klokkan 04.25 varð ein dani tikin fyri rúsdrekkakoyring. Blóðroynd varð tikin av manninum, sum hevði ov høga promillu og er sostatt ákærdur fyri rúsdrekkakoyring. Viðkomandi varð leyslatin aftur av støðini klokkan 05.00, og í hesum tíðarskeiði hevði blóðroyndin sambært løgregluni avdúkað, at lógin varð brotin.

Løgreglan upplýsir ikki navn og aldur á viðkomandi dana, men biður okkum venda okkum til FC Keypmannahavn at fáa tíðindini um Silberbauer váttað. Sostatt kann talan í prinsippinum vera um onkran annan enn 22 ára gamla evnaríka Silberbauer, men við støði í frágreiðingini hjá FCK-leiðsluni kunnu tvey og tvey leggjast saman: Silberbauer varð steðgaður av løgregluni í Tórshavn mikukvøldið, og ein dani varð sama kvøld skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring. Talan var eisini um sama kvøld, FCK-leikararnir stuttleikaðu sær í býnum í Havnini.

Um hetta er so, fær tilburðurin allarhelst avleiðingar fyri Silberbauer, sum fyrr um kvøldið skeyt tvey mál móti føroyameistarunum úr HB á Tórsvølli. Kanska varð Silberbauer í so glaður fyri málini...



*Laura Thomsen hevur staðið fyri stovnsetanini av matstøðum til børn, ið fáa ov lítið at eta. Talan er um børn í flóttalegu uttanfyri býin Garsila. Hvørja viku fáa 700 børn í Garsila ikki nøktandi føði, meðan 280 børn eru sera illa fyri orsakað at hungri.*

*Mynd: Reuters*



# Heim úr Sudan

Tann 33 ára gamla føroysk-danska sjúkrasysturin Laura Thomsen er júst heimkomin aftaná tríggjar mánaðir í Sudan. Hon hevur gjørt hjálpararbeiði í Darfur-økinum fyri Læknar uttan Mørk (MSF).

Laura Thomsen hevur staðið fyri stovnsetanini av matstøðum til børn, ið fáa ov lítið at eta. Talan er um børn í flóttalegu uttanfyri býin Garsila. Hvørja viku fáa 700 børn í Garsila ikki nøktandi føði, meðan 280 børn eru sera illa fyri orsakað at hungri.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at føroysktfødda Laura Thomsen hevur verið úti í stóru verð og hjálpt fólki. Í 2001 var hon í Afghanistan í sjey mánaðir, og árið eftir gjørdi hon hjálpararbeiði í Sierra Leone.

Læknar uttan Mørk hava veitt hjálp í Darfur síðan desember 2003. Felagsskapurin hevur í dag 100 altjóða hjálpararbeiðarar í Darfur. Harumframt hava Læknar uttan Mørk 2.000 sudanar í arbeiði fyri at berta um umstøðurnar í Darfur-økinum.

Fleiri enn 600.000 flóttafólk eru í økinum.

*-hkm, úr tíðindaskrivi fra MSF*

# Góðveður í Fugloy



*Tyrlan er lend*

*Ferðafólk drekka sodavatn*





*Fara við tráðu*

**Myndir: Hans Kárason Mikkelsen**

### Heimsins størsta enn størri

Amerikanska felagið General Electric fekk stak gott úrslit í øðrum ársfjórðingi í ár. Felagið økti bæði um umseting og vinning. Hetta skrivar heimasíðan hjá Business-Line. Nettoúrslitið vaks 23,5 milliardir krónur. Sama tíðarskeið í fjør var vøksturin 22,7 milliardir krónur.

Business-Line skrivar, at góða úrslitið kemst av øktum eftirspurningi eftir motorum til flogfør. General Electric hevur góðar fíggingarmøguleikar til síni viðskiftafólk, og hetta hevur helst eisini økt um søluna.

– Støðan í felagnum er tann besta í áravís, sigur Jeff Immelts, forstjóri hjá General Electric, heimsins størsta felag.

**-hkm**

### Umfatar alt



Danska alivinnan hevur nú valt at skipa seg í eitt felag, sum skal styrkja um vinnuna. Felagið umfatar øll liðini í framleiðsluni. Bæði alarar, fóðurframleiðarar, góðskingarvirki og útflytarar eru í nýggja felagnum, sum kallar seg Dansk Akvakultur. Umleið 300 limir eru í felagnum, og limirnir framleiða okkurt um 50.000 tons av fiski. Útflutningsvirðið er ein milliard krónur um árið. Formaður í Dansk Akvakultur er alarin Jacob Bregnballe frá Asnæs Fiskeopdræt. Nýggja felagið heldur til á HC Andersens Boulevard í Keypmannahavn.

**-hkm**